# *Samandráttur av eyka Bygdaráðsfundi 11.04.2015*

**Eyka Bygdaráðsfundur 11.04.2015 kl. 13.00 til kl. 13.45**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 18/ 2015 Havnin**

J.nr. 2015-0046-0077

**Málslýsing**

Í samband við arbeiðið av at leggja nýggjar leiðingar, vegagerð og asfaltering v.m. omanfyri bátahylin í Oyrunum, heldur Tekniska nevnd at omankoyringin og P-økið eisini eigur at verða dagført.

Tekniski leiðarin hevur, 10.04.2015, dagført kostnaðarmetingina av íløguni av samlaðu vegagerðini v.m. omanfyri bátahylin í Oyrahavnini, og er samlaði kostnaðurin nú mettur til kr. 1.443.470,00.

Kostnaðarmetingin frá 07.04.2015 var áljóðandi kr. 1.294.200,00. Sostatt ein mettur meirkostnaður uppá kr. 149.270. Á bygdaráðsfundinum 23.03.2015 játtaði bygdaráðið kr. 809.000 til íløguna.

Tekniski leiðarin hevur eisini innheintað tilboð uppá asfaltering av øllum økinum, frá EM Asfalt og HJ Asfalt.

**Tilmæli**

Bygdaráðið mælir til, at taka av tilboðnum frá EM.Asfalt.

Í sambandi við asfalteringina og meirkostnaðin mælir bygdaráðið til at játta kr. 634.470 afturat til vegagerð v.m. omanfyri bátahylin. Peningurin verður tikin av stovninum Teknisk mál íløgur.

**Avgerð**

Bygdaráðið samtykt einmælt at taka av tilboðnum frá EM Asfalt, og at meirkostnaðurin kr. 634.470 verður tikin av stovninum Teknisk mál íløgur.